## Tómhentur úr Silkeborg

Senegalesiski B68-framherjin, Ahmed Keita, sum hevur verið til royndarvenjing í danska felagnum, Silkeborg, kemur nú heimaftur til B68, tí sáttmáli ikki spurdist burturúr. Hinvegin hevur Silkeborg, sum frammanundan hevur føroyska landsliðsspælaran, Christian Lamhauge Holst, í hópinum, sýnt størri áhuga fyri 19 ára gamla Sandro Spasojevic, ið eisini hevur verið til royndarvenjing har í eina viku.



## Lava skoraði fyri Frem

Andreas Lava Olsen skoraði og vann eitt brotsspark í venjingardysti fyri Frem ímóti Brønshøj í farnu viku, umframt at hinir báðir føroyingarnir í felagnum, Bogi Løkin og Jónas Þór Næs, eisini vóru partur av sigrinum. Í steðginum fór Andreas út og Bogi kom inn á miðvøllin og Jónas Þór inn á høgra bakk. Frem hevði fleiri møguleikar í seinna hálvleiki og fekk eitt mál, so dysturin endaði 2-0.

# Svimjingin fingið status

**Formaðurin í Svimjisambandinum, Jon Hestoy, er sera fegin um tann stuðul, Pál Joensen fær. – Svimjingin hevur heilt klárt fingið ein status, hon ikki altíð hevur havt, sigur hann**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

– Tað má kennast fantastiskt hjá Páli, at hann nú merkir uppbakningin, sum er. Hesin stuðulin, hann nú hevur fingið, fer at gera lívið lættari hjá honum, samstundis sum stuðulin frá landinum syrgir fyri kappingunum og tí, sum skal til har, sigur Jon Hestoy, ið taldist millum tey mongu, ið vóru til móttøkuna seinnapartin leygardagin, tá Pál Joensen fekk P/f Leif Mohr sum høvuðsstuðul.

– Hetta er ein staðfesting av, at fólk síggja, at vit hava nakrar framúrskarandi verkætlanir í svimjingini. Tað er sjáldan, at vit hava sæð sovorðið sum hetta, at ein fyritøka vil gera nakað serligt og tí vil stuðla Pál. Hetta er gott fyri svimjingina, sum heilt klárt hevur fingið ein status, hon ikki altíð hevur havt.

Jon Hestoy vísir eisini á, at 2009 ikki bleiv tað árið samanumtikið, sum Pál ella nakar annar hevði ynskt, men at nýggi stuðulin kann hjálpa honum væl á leið í 2010.

– Eg trúgvi, at mest av øllum brennir Pál fyri, at 2010 verður árið, tá hann fær prógva sítt virði og uppfylt tað potentiali, sum tað er heilt týðiligt, at hann hevur. Lat okkum so vóna, at tað eisini fer at eydnast, sigur formaðurin í Svimjisambandinum.



Jon Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, vónar nýggi stuðulin fer at hjálpa Pál Joensen at røkka sínum málum fyri 2010

Mynd: Trúgvi Dam

## Skilagóð satsing

**Nú ein privat fyritøka hevur givið sítt íkast oman á almenna stuðulin til okkara fremsta ítróttarmann, eru møguleikarnir hjá Páli Joensen nógv størri enn áðrenn**

ÍTRÓTTARKLUMMAN

*Hilmar Jan Hansen*

*einslistir@kallnet.fo*



Síðstu vikuna hava vit sæð íslendingar mótprógva, at ein lítil tjóð ikki eisini kann standa seg í liðítrótti. Við sínum 300.000 íbúgvum megnar Ísland at manna eitt hondbóltslandslið, ið stendur seg í kappingini við tey allarbestu. Ikki bara eigur Ísland besta landslið í Norðurlondum, men eisini triðbesta landslið í Europa, sum telur gott og væl 700 milliónir íbúgvar!

Annars verður altíð sagt, at skulu Føroyar gera seg galdandi í ítrótti á altjóða stigi, so má tað vera við onkrum úrmælingi, ið kann taka seg fram í einstaklingaítrótt. Hondina á hjartað, so eiga vit tíverri einki landslið, ið kann fremja eitt bragd, ið kemur tí íslendska til knýggja, so í okkara føri er helst skilagott at taka hin møguleikan.

Hetta er so sanniliga eisini ein møguleiki, tí í løtuni eiga vit ein av heimsins bestu svimjarum. Hann hevur ikki somu venjingarmøguleikar sum mótstøðumenninir, men kortini drívur hann á og vísir í verki, hvussu stóran týdning tað hevur, at viljin er har og at farið verður eftir málinum. Vit hava sæð, at hann hevur sínar javnlíkar í heimselituni, og tí skal hann sjálvandi hava allan tann stuðul, ið gevast kann í slíkum føri.

At Pál aftur í ár fær ein munagóðan part av tí, sum almennu Føroyar hava játtað á fíggjarlógini til úrvalsítrótt, er at fegnast um. Tað gevur neyðugu karmarnar, so okkara fremsti ítróttarmaður kann fara til tær kappingar, har hann kann gera seg galdandi. Í veruleikanum skuldi tað bara manglað!

Men so mikið meira er at fegnast um, at ein privat fyritøka – enntá óbiðin – tekur tað næsta stigið, so Pál kann fyrireika seg, venja og liva, so hann hevur optimalar umstøður at røkka teimum úrslitum, ið játtanin annars røkkur til.

Hetta er skilagóð satsing, ið fær »síðstu brikkarnar upp á pláss,« so ein meining veruliga verður við stuðlinum annars. Flott, P/f Leif Mohr, og góða eydnu, Pál!



Marlon Kjærbo, formaður í Suðuroyar Svimjifelag, heldur tað vera gott, at ungu svimjararnir í felagnum kunnu síggja upp til Pál

Mynd: Trúgvi Dam

# Lættir um hjá okkum

**– At Pál hevur fingið ein góðan høvuðsstuðul, lættir um hjá okkum, sigur formaðurin í Suðuroyar Svimjifelag, Marlon Kjærbo**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

– At vera formaður í einum felag sum Suðuroyar Svimjifelag, er ein kapprenning um pengar hvønn einasta dag, fyri at fáa tað at mala runt. Tí eru vit sera takksom fyri, at P/f Leif Mohr stuðlar Páli í hesum, sigur Marlon Kjærbo, sum nýliga er blivin formaður í Suðuroyar Svimjifelag.

– Hetta ger, at vit kanska kunnu taka tað eitt sindur meira róligt, tá tað snýr seg um at renna eftir pengum. Men tá tú sært hesi ungu í hylinum og tað arbeiði, tey leggja í tað, so hugsar tú, at tað er alt stríðið vert.

Marlon sigur, at tað hevur verið ein trupulleiki, at felagið bara hevur havt ein venjara, Jón Bjarnason, ið haraftrat hevur verið nógv burturi við Páli. Men nú felagið hevur fingið ein venjara aftrat, Sheilu millum Garðarnar, er tað blivið nógv meira sum ein eind.

– Tað er ein stór avbjóðing fyri felagið, at vit hava nógvar og góðar svimjarar – og so eina stjørnu. Veruleikin er, at vit hava ringt við at fylgja við Páli, tí hann er blivin so mikið stórur. Men samstundis er tað ein gularót fyri hinar ungu svimjararnar hjá okkum, at vit hava hann í felagnum, sigur Marlon Kjærbo.

– Tá vant verður, svimur hann í eini geil fyri seg sjálvan, og so venja hini við síðuna av. Eg haldi, at tað hevur hjálpt fleiri av hinum, sum eru á veg, at tey kunnu síggja upp til hann.